# Mín fyrsta flamma     Hoyr lagið

Orð og lag: Jógvan Skaale

```
     A
Eg tonki uppá mína fyrstu flammu
                D                                  A
-    eg havi bílæt av henni í glas og rammu.
     E7                                                A

Eg minnist tá eg fekk tað, tað er sum í gjár,
              H7
Hon stóð har við skeivum tonnum
     E7
og ópleygaðum hár
     A        A7         D
LurtaJa, kálvakníggjað var hon tá
     E7                                           A
Og sløtt sum eitt vaskibrett´ at líta á
                   E7                   A
Men tað, tað tonkti eg ikki uppá
      A           E7                   A
Nei tað, tað tonkti eg ikki uppá.
```

Teir tankar teir vóru mær fjar´
Tí hon var alt og eitt hjá mær.
Vit gingu hond í hond
Og vit droymdu okkum burtur til fremmand lond
Tað eru nú gingin fleiri ár
Men eg minnist tað sum tað var í gjár
Jú, minnini tey eru klár

Tað gentuna við teim´ skeivu tenn´
Minnið um hana eg goymi enn
Ja, altíð vit vóru saman
Bæði í mótgang og í gaman
Aldri eg vil hana gloyma
Men altíð um hana droyma
Ja, um hana droyma

Eg sera væl ein dagin minnist
Minnið í hjarta mínum finnist
Eg segði: Mín blív
Og vit svóru hvørjum øðrum trúskap
gjøgnum alt lív
Bæði í viðgang og í neyð
Men tað, tað kundi ei halda

Tí hon var bert seks og eg var sjey.